Kappingarráðið

Vegleiðing

um

Samanleggingareftirlit

1. Samanleggingareftirlit

Við gildi frá 1. januar 2008 er samanleggingareftirlit sett á stovn í Føroyum. Tað merkir, at allar samanleggingar frá 1. januar 2008 ella seinni skulu fráboðast til Kappingareftirlitið tá ið minst 2 av luttakandi fyritøkunum hvør sær hava ein árligan umsetning í Føroyum uppá 4 mió. kr. ella meira ella tá ið samanløgdu fyritøkurnar hava ein árliga umsetning í Føroyum uppá 75 mió. kr. ella meira samanlagt. Fráboðanarskyldugar samanleggingar kunnu ikki fremjast fyrr enn Kappingarráðið hevur mett og givið góðkenning.

Endamálið við samanleggingareftirlitinum er ikki at forða samanleggingum, men at tryggja, at samanlegging ikki tálmar virknari kapping við at skapa ella styrkja eina ráðandi støðu.,

Kappingarráðið hevur heimild til at lýsa eina samanlegging ógilduga ella góðkenna treytir fyri samanleggingini (geva tilsøgn), men sannlíkt er, at tað sjáldan verður neyðugt at nýta hesa heimild.

Ásetingarnar um samanleggingareftirlit eru at finna í kappingar lógini kap. 5 (§§ 13-18), í reglugerð nr. 2 frá 10. jannuar 2008 um fráboðanir av samanlegging við fylgjandi fráboðanarskjølum og í kunngerð nr. 9 frá 11. mars 2008 um útrokning av umsetningi. Reglugerð og kunngerð liggja á heimasíðuni hjá Kappingarráðnum www.kapping.fo.

Henda vegleiðing er ætla sum ein hjálp til tær fyritøkur, sum fara ella umhugsa at fremja eina samanlegging. Vegleiðingin kemur ikki ístaðin fyri ásetingarnar í kappingarlógini ella teimum við heimild í kappingarlógini tilhoyrandi kunngerðum og reglugerðum.

2. Nær er talan um samanlegging?

Talan er um samanlegging,

1. Tá ið tvær ella fleiri higartil óheftar fyritøkur blíva til eina fyritøku.
2. Tá ið ein ella fleiri sjálvsstøðugar fyritøkur fáa fult ella lutvíst ræði beinleiðis ella óbeinleiðis í einari ella fleiri fyritøkum.
3. Tá ið tað verður stovna eitt joint venture, um hetta verður gjørt á varandi grundarlagið og hevur um hendi alt virksemið eins og hjá sjálvsstøðugari fyritøku.

Stovnan av einum joint venture, har ið tað ikki er felags ræði, ella sum ikki hevur eina møguliga gildistíð, ella sum ikki eru sjálvstøðugt virkandi (ráa yvir nóg stórum fíggjarligum tilfeingi ella leiðslu ávirkan) eru

ikki at meta sum ein samanlegging. Ein tílík joint venture kann har afturfyri verða fevndur av forboðið ímóti kappingaravmarkandi avtalum í kappingarlógini § 6, stk. 1. Víst verður til vegleiðing.

Ræði á einari fyritøku skal skiljast soleiðis, at tað fæst ræði á fyritøkuni gjøgnum heimildir,, avtalu ella á aðrar mátar, ið einsæris ella til samans geva møguleika fyri at fáa avgerandi ávirkan á virksemi.

Samenleggingar í eini koncern eru ikki fevndar av kappingarlógini og hevur tí heldur ikki fráboðanarskyldu. Samanleggingar í eini koncern eru, tá ið talan er um endurskipan av einum virki, og tá ið ein samanlegging ikki hevur við sær ræðisbroytingar. Tað kann t.d., vera í førum, har ið eitt móðurfelag verður lagt saman við einum av sínum dótturfeløgum.

3. Hvussu fráboðast ein samanlegging

Tá tað er greitt, at her er talan um eina samanlegging, skal tað fráboðast til Kappingarráðið. Tað verður gjørt við oyðublaði ið nevnist "K2". Oyðublaðið kann heintast á heimasíðuni hjá Kappingarráðnum. Adressan á heimasíðuni er www.kapping.fo.

Fráboðanarskjalið er deilt upp í Part A og Part B. Fyritøkur skulu útfylla Part A og svara uppá spurningarnir á Parti B. Tað er galdandi fyri allar samanleggingar. Men Kappingarráðið kann geva undantøk í samband við skyldu til at svara uppá spurningarnir í Parti B, um Kappingarráðið metir, at upplýsingarnir ikki eru neyðugar fyri kanningina av málinum. Tað kann tí vera ein fyrimunur fyri fyritøkurnar um tær venda sær til Kappingarráðið fyrst og tosa um innihaldi og um hvørjir upplýsingar skulu sendast inn.

Fráboðan um samanlegging skal gerast í seinasta lagi eina viku eftir, at eitt av fylgjandi trimum krøvum er lúka:

1. Semjan um samanlegging er gjørd
2. Samanleggingin er kunngjørd alment, ella
3. Onkur ávísur hevur fingið ræði á fyritøkuni

Ein fráboðan skal verða fullfíggjað, fyri at hon kann metast fyri at vera fráboða.Kappingarráðið skal áðrenn 8 dagar frá móttøkuni vátta fyri fráboðanini og siga frá um fráboðanin kann metast at vera fullfíggja. Um fráboðanin ikki kann metast at vera fullfíggjað, so skal Kappingarráðið áðrenn 8 dagar frá móttøkuni boða samanleggingar pørtunum frá, hvat teir skulu gera fyri at bøta um trupulleikan. Tá ið ein fullfíggjað fráboðan fyriliggur, kann Kappingarráðið byrja metingina av samanleggingini. Beinanvegin eftir fráboðanina kunngerð Kappingarráðið á sínari heimasíðu, at tað hevur móttikið eina fráboðan um samanlegging og at áhugaði kunna koma við viðmerkingum áðrenn 1 – 2 vikur. Kappingarráðið kann lata vera við at alment kunngera samanleggingina, um mett verður at tað ongan týdning hevur fyri metingina av samanleggingini.

Slag av samanleggingum

Tá ið fráboðanin er móttikin til tíðina, og hon er nøktandi, bólkar Kappingarráðið hana í ein av fylgjandi trimum bólkum:

Kappingarráðið

Bólkur I samanleggingar: Fráboðanarskyldugar samanleggingar, ið Kappingarráðið ikki metir at hava týdning fyri marknaðin, og har samlaði umsetningurin hjá samanløgdu fyritøkunum liggur undir 75. mió. kr. árliga.(Fyri hendan samanleggingarbólkin vil tað – eftir nærri avtalu við Kappingarráðið – sum oftast vera nokk at útfylla Part A í K2 skjalinum.)

Bólkur II samanleggingar: Fráboðanarskyldugar samanleggingar, ið Kappingarráðið metir, kunnu hava týdning fyri marknaðin, og har umsetningurin hjá samanløgdu fyritøkunum liggur undir 75. mió. kr. árliga og

Bólkur III samanleggingar: Fráboðanarskyldugar samanleggingar, har umsetningurin hjá samanløgdu fyritøkunum liggur omanfyri 75. mió. kr.

Útroknan av umsetningi

Allar samanleggingar eru fráboðanarskyldugar, har ið tvær av fyritøkunum, hvør sær, hava í minsta lagi ein umsetning á 4. mió. kr á føroyska marknaðinum.

Samanleggingar, sum av Kappingarráðnum kunnu metast at hava týdning fyri marknaðin, og har samanleggingarpartarnir tilsamans hava ein árligan umsetning omanfyri 75. mió. kr.á føroyska marknaðinum, ella har 2 av pørtunum hava ein árligan umsetning á føroyska marknaðinum uppá minst 4. mió. kr. hvør, skulu metast av Kappingarráðnum eftir kappingarlógini § 15.

Sum oftast er eingin ivi um, hvørt samanleggingarpartarnir hava ein umsetning ið er undir 4. mió. kr., ímillum 4 og 75 mió. kr., ella samanlagt yvir 75 mió. kr. Men tá ið umsetningurin liggur umleið markvirðini, er brúk fyri meira nágreiniligari útrokning. Í kunngerð nr. 9 frá 11. mars 2008 um útroknan av umsetningi er upplýst nágreiniliga hvussu farast skal fram.

Við útroknan verður tikin við umsetningurin ið samanløgdu fyritøkurnar hava, t.v.s. fyritøkurnar sum eru partar í samanleggingini. Tá ið umsetningurin hjá einari fyritøku ið luttekur í samanleggingini verður útroknaður, skal umsetningurin hjá allari koncernuni takast við. Tað vil siga umsetningurin hjá móður og dótturfeløgum og onnur partafeløg í koncernuni, eisini fyritøkur,sum luttakarar í samanleggingini beinleiðis ella óbeinleiðis hava ræði á skulu innroknast.

Tað er sostætt umsetningurin hjá luttakandi fyritøkunum og teirra koncernumsetningur, ið er avgerandi tá ið støddin á umsetninginum verður rokna. Tað er allur umsetningurin hjá fyritøkunum ið skal takast við og ikki bara tann parturin ið viðkemur vørum ella marknaðum sum eru viðkomandi fyri samanleggingina.

Tað hevur onga ávirkan um fyritøkan er almenn ella privat ella um talan er um fíggjarstovnar, men tað eru serligar reglur fyri hvussu umsetningurin hjá eini luttakandi fyritøku verður útrokna tá ið tað almenna, ein kommuna ella ein fíggjarstovnur v.m. luttekur. Nærri reglur eru ásettar í kunngerð nr. 9 frá 11. mars 2008 um útroknan av umsetningi.

Viðgerð av samanleggingum

Kappingarráðið viðgerð teir tríggjar bólkarnir av samanleggingum á fylgjandi hátt:

1. Í førum har talan er um bólk I samanlegging, váttar Kappingarráðið seinast 30 dagar eftir

móttøku av fullfíggjaðari fráboðan, at fráboðanin er móttikin, og at hon ikki verður viðgjørd.

2. Í førum har talan er um bólk II samanlegging, váttar Kappingarráðið seinast 30 dagar eftir móttøku av fullfíggjaðari fráboðan, at fráboðanin er móttikin, og at Kappingarráðið vil taka avgerð um gjøllari meting av samanleggingini skal gerast eftir Kappingarlógini § 15 við atliti til eitt forboð ella eina játtan.
3. Í førum har talan er um bólk III samanlegging, váttar Kappingarráðið seinast 30 dagar eftir móttøku av fullfíggjaðari fráboðan, at fráboðanin er móttikin, og at kappingarráðið vil viðgera samanleggingina eftir § 15 í kappingarlógini við atliti til eitt forboð ella eina játtan.

Metingin av eini fráboðan er býtt sundur í 2 partar. Í fyrsta parti (fasa 1)skal Kappingarráðið góðkenna samanleggingina ella taka avgerð um, at íverkseta eina gjøllari kanning av samanleggingini, hettar í seinasta lagi 30 dagar eftir at ein fullfíggja fráboðan er móttikin. Um Kappingarráðið avgerð at íverkseta eina gkøllari kanning av samanleggingini verður fari víðari til næsta part (fasa 2), har endalig avgerð skal verða tikin í seinasta lagi 3 mánaðir eftir móttøkuna av eini fullfíggjaðari fráboðan.

Tíðarfreist

Fráboðan um eina fráboðanarskylduga samanlegging skal verða Kappingarráðnum í hendi áðrenn eina viku eftir, at (1) avgerð um samanlegging er tikin, (2) samanleggingin er kunngjørd alment, ella (3) onkur ávísur hevur fingið ræðið á fyritøkuni.

Ein fráboðan skal vera fullfíggjað um hon skal metast at vera fráboða. Um ikki, so skal Kappingarráðið innan 8 dagar frá móttøkudegnum vátta fyri móttøkuni og geva samanleggingarpørtunum frágreiðing um hvussu trupuleikin kann loysast. Hendan mannagongd verður endurtikin inntil ein fullfíggja fráboðan fyriliggur, og síðani kann Kappingarráðið byrja viðgerðina av samanleggingini.

Kappingarráðið skal innan 30 dagar (fasa 1) eftir, at samanleggingarfráboðanin er góðtikin, geva samanleggingarpørtunum boð um, at samanleggingin ongan týdning hevur fyri marknaðin og tí ikki verður viðgjørd (bólkur I), um Kappingarráðið heldur grundarlag verða fyri gjøllari kanningum av tí kappingarligu ávirkanini av samanleggingini við at fara víðari til fasu 2, sum hevur við sær at samanleggingin skal metast eftir kappingarlógini § 15 (bólkur II samanleggingar upp til 75 mió. kr. í umsetningi), ella um talan er um eina samanlegging sum skal víðari til fasu 2 og viðgerast eftir kappingarlógini § 15 (bólkur III samanleggingar), av tí at samanleggingin hevur týdning fyri marknaðin og árligi umsetningurin er yvir 75 mió. kr. Í teimum førum, har ið boð vera givin um, at fari verður fram eftir § 15, verður viðgerðin førd víðari til fasu 2. Um tílík boð ikki verða givin innan freistina á 30 dagar, verður samanleggingin at meta sum góðkend. Avgerðin um at ógilda eina samanlegging skal takast seinast 3 mánaðir eftir, at Kappingarráðið hevur boða frá at fari er frá fasu 1 til fasu 2 viðgerðar hátt.

Fyri at tryggja at ein møgulig avgerð um ógilding ella góðkenning verður fylgd, kann Kappingarráðið leggja seg uppí samanleggingina. Uppíleggingin kann til dømis vera eitt fyribils forboð ímóti at fremja samanleggingina ella inntil Kappingarráðið er liðugt við at kanna málið..

Kappingarráðið

Ógildan, noktandi svar ella játtan

Tá ið Kappingarráðið gevur boð um, at ein samanlegging er ógildug, gevur forboð ella játtar eini samanlegging at fara fram og sum skal gerast innan ásetta tíð, so skal tað tað vera grunda á gjøllar kanningar og út frá einari meting um:

samanleggingin er skaðilig fyri kappingina, tí fylgjan er, at ein ráðandi marknaðarstøða uppstendur ella verður styrkt.

Kappingarráðið skal við hesi meting taka fyrilit til, í hvønn mun millumlanda kapping ávirkar kappingarstøðuna hjá samanløgdu fyritøkunum, og um atgongdin til marknaðin er frí ella avmarkað.

Ein ráðandi støða er eyðkenni, tá ið samanløgdu fyritøkurnar í størri ella minni mun kunnu virka sjálvstøgut og leysar av kappingarneytunum. Tað er nærliggjandi at halda, at, ein samanlegging sum skapar ella styrkir ein ráðandi støðu kann forða virknari kapping, men tað nýtist ikki so at verða. Her er í stóran mun talan um eina ex ante meting.

Ein avmarkan av viðkomandi marknaði í framleiðslu og landafrøðiligum høpi er avgerandi fyri metingina. Ein annar avgerandi lutur í samband við metingina er møguleikin fyri úboðssubtitutión bæði uppá langt og stutt sikt. Tað er tí umráðandi at útvega sær upplýsingar um atgongd til marknaðin og stødd á marknaðarforðingum. Aðrir umráðandi upplýsingar eru marknaðarbygnaðurin og kunda - og veitarabygnaðurin.

Um Kappingarráðið heldur, at ein samanlegging forðar fyri virknari kapping av tí at ein ráðandi marknaðarstøða uppstendur ella verður styrkt,, kann Kappingarráðið ógilda samanleggingina. Tær fyritøkur ið luttaka í samanleggingini kunnu velja at binda seg yvir fyri Kappingarráðnum samstundis ella við sertreyt at geva boð um býti av yvirtiknu fyritøkunum ella vinnutólum ella uppathald av felags ræði ella eitthvørt annað fyrivarni, ið kann fáa viðurskiftini aftur í rætt lag.

Fráboðan um bindandi forboð ella játtan

Við atliti til at steðga skaðiligari ávirkan av eini samanlegging kann Kappingarráðið geva forboð. Eisini kann ráðið geva tær tilsøgnir, ið samanleggingarpartarnir hava givið fyri at ongin ivi skal verða hjá Kappingarráðnum, bindandi, jb. § 23.

Kærustovnur

Kappingarráðið

Tiknar avgerðir kunnu eftir kappingarlógini § 27, stk. 1 vera kærdar til kærunevndina í kappingarmálum í seinasta lagi 4 vikur eftir at fráboðan um avgerð er send til viðkomandi. Kærunevndin í kappingarmálum kann í serligum umstøðum síggja burtur frá um kærufreistini er farin. Kærur kunnu av Kappingarráðnum ella Kærunevndini verða steðgandi. Kærunevnd skal koma við einari niðurstøðu í seinasta lagi 6 vikur eftir at hon hevur móttikið málið. Avgerðin ið Kærunevndin hevur tikið, kann skjótast inn fyri Føroya Rætt, í seinasta lagi 8 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið boð um avgerðina. Eftir hetta er avgerðin endalig.

Ynskjast fleiri upplýsingar, ráð ella vegleiðingar?

Kom inn á Kappingarráðið ella set teg í samband við okkum. Tað kann oftast vera til stóra nyttu, at tosað í trúnaði og óformelt, longu tá ið fyritøkan ætlar at fara undir eina samanlegging.

Vendi tykkum til:

Kappingarráðið

Skálatrøð 20

P. O. Box 73

FO-110 Tórshavn

Telefon: +298356040

Telefax: +298356055

E-post: kapping@kapping.fo

Eitt samanleggingar mál

stig fyri stig

Kappingarráðið